– Fólk finna seg ikki í at verða viðfarin soleiðis.

*Ónevnd kelda í Start um atburðin hjá uppsagda venjaranum Tom Nordlie mótvegis spælarum og leiðarum í felagnum*

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801



# Fenerbahce er í dýrastu neyð

**Turkiska stórfelagið Fenerbahce vil hava hundrað hotellkømur í Føroyum, um felagið skal hendan vegin at spæla ímóti B36. Trupulleikin er bara, at føroysku gistingarhúsini eru á tremur við fólki í hægstu summartíð, og tað er sera trupult at finna rúm til eitt so stórt ferðalag**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Um B36 mikukvøldið klárar at halda fast um sína leiðslu ímóti Birkirkara, kemur føroyska liðið víðari í Champions League kappingini, og í næsta umfari skal B36 so spæla ímóti turkiska felagnum Fenerbahce.

Í Turkalandi eru tey farin í holt við at fyrireika ferðina til Føroya, tí tey rokna við, at B36 verður mótstøðuliðið eftir 3-0 sigurin á Birkirkara á Malta. Og umboð fyri Fenerbahce hava vent sær til bæði B36 og Fótbóltssambandið í sambandi við ferðina til Føroya.

Fenerbahce hevur biðið um hundrað rúm til at hýsa stóra ferðalagnum, sum umfatar spælarar, venjarar, leiðarar, fjølmiðlafólk og onnur, men tað er sera trupult at finna so nógvum fólkum innivist í Føroyum í hægstu summartíð.

## NM og summargestir

Um B36 kemur víðari í kappingini, verður seinni dysturin ímóti Fenerbahce spældur í Havn týsdagin 1. august. Hetta er sama vika, sum nógvir útlendskir fótbóltsgestir eru í Føroyum.

Føroyar eru vertir fyri NM fyri U17 landslið, og ein ørgrynna av fólki kemur til Føroya í tí sambandi. Seks landslið eru í Føroyum ta vikuna, umframt dómarar, eygleiðarar og umboðsfólk av ymsum slagi.

Fótbóltssambandið hevur langt síðani syrgt fyri innivist til hesar stívliga 200 gestirnar, og FSF brúkar meginpartin av Hotel Føroyum, sum er fasta hotellið hjá FSF, og Kirjalon til at hýsa gestunum.

Hini gistingarhúsini í Føroyum hava eisini nógvar gestir í hægstu summartíð, og tí er tað næstan vónleyst at grava nógv hotellkømur fram fyrstu vikuna av august.

## Hugsa um dystin mikukvøldið

Fenerbahce hevur vent sær til B36, sum teir rokna við, at teir skulu spæla ímóti, fyri at fáa hjálp at finna innivist í Føroyum.

– Vit fáa illa farið í holt við ítøkiligar fyrireikingar til dystin ímóti Fenerbahce, fyrr enn vit hava spælt seinna dystin ímóti Birkirkara. Vit kenna okkum als ikki vísar í at koma víðari, fyrr enn seinni dysturin er spældur, og tí mugu vit fyrst og fremst hugsa um uppgávuna mikukvøldið, sigur Kristjan á Neystabø, sum tekur sær av virkseminum kring besta liðið hjá B36.

– Men vit vita um, at Fenerbache fyrireikar sína ferð til Føroya, og at tað er sera trupult at fáa innivist fyri einum so stórum ferðalagi her. Í løtuni vita vit ikki, hvussu trupulleikin verður loystur, men um Fenerbahce skal til Føroya, so rokna vit við, at tað fer at bera til at hýsa teimum her, sigur Kristjan á Neystabø.

Áðrenn uppgávan ímóti turkiska stórfelagnum verður veruleiki, skal B36 tryggja sær luttøkuna í næsta umfari, og tað skulu teir gera á Tórsvølli mikukvøldið.



*Tað er einki rúm fyri Anelka, Tuncay og hinum á liðnum hjá Fenerbahce, um teir skulu til Føroya at spæla ímóti B36 1. august. Turkiska felagið arbeiðir nú av øllum alvi við at fyrireika ferðina til Føroya um tvær vikur*

*Mynd: Scanpix*

## Julian flytir til Danmarkar

**Í dag flytir Julian Johnsson til Danmarkar at búgva, men hann skal halda fram við at spæla fyri B68 restina av kappingarárinum**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Julian Johnsson er slopp-in inn á læraraskúla í Svendborg, og í dag flytir hann saman við familjuni til Danmarkar at búgva.

– Eg má flyta til Danmarkar av praktiskum orsøkum, og eg havi tosað við B68 um støðuna hjá mær. Vit hava funnið eina loysn, sum báðir partar kunnu liva við, og okkara samstarv heldur fram restina av árinum, sigur Julian Johnsson, sum í fjør var spælandi venjari hjá B68, men sum í ár bara hevur spælt, til Jóannes Jakobsen varð sagdur úr starvi fyri góðari viku síðani.

Hóast hann flytir til Danmarkar at búgva, gevst Julian tó ikki at spæla fyri B68, og hann verður við í teimum 10 dystunum, sum felagið hevur eftir at spæla í hesum kappingarárinum.

– Eg fari at venja niðri, men eg skal ferðast heim til dystirnar hjá B68 restina av hesum kappingarárinum, sigur hann.

## Finna sær felag í Danmark

Julian fer í fyrstu syftu at venja í Svendborg, har fremsta felagið spælir í Danmarksseriuni, men hann ætlar sær at finna eitt annað felag, tá ið samstarvið við B68 endar.

– Eg kundi hugsa mær at funnið mær eitt felag, sum spældi í eini hægri deild, tí eg havi framvegis ambitiónir við fótbóltinum. Í vetur ætli eg mær av venja meira miðvíst við knænum, sum eg hevði skaða í, og so er ætlanin at fara at royna meg í onkrum felag í Danmark í januar mánaði, sigur hann.

Julian sleit í fjør krossband í knænum, men hann hevur nú spælt aftur seinastu vikurnar, og tað hevur gingið støðugt framá hjá honum.